Sunleiv Højgaard, átaksleiðari:



*Stabila støðan, sum hevur verið rundan um Athenu, broyttist í gjárkvøldið og í nátt, tá staðfest varð, at skipið lekur. Nógvur aktivitetur var við oljubryggjuna seint í gjárkvøldið og alla síðstu nátt*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Reellur vandi fyri at Athena kann søkka við bryggju í Runavík

**ATHENA** Síðstu nátt váttaði Sunleif Højgaard, átaksleiðari hjá Skálafjarðar Sløkkiliði, at nú Athena tekur sjógv inn, er – sum hann tók til - ein reellur vandi fyri, at skipið kann søkka við oljubryggjuna í Runavík

Vilmund Jacobsen

Í gjárkvøldið broyttist annars stabila støðan, sum mett hevur verið, at Athena hevur verið í, og hetta førdi til nógv virksemi á oljubryggjuni hjá Runavíkar havn um midnáttarleitið í gjárkvøldið.

Fleiri bilar hjá Skálafjarðar Sløkkiliði og øðrum sløkkiliðum í Eysturoy, fleiri sløkkiliðsfólk og løgregla troppaðu upp á bryggjuni, og tað skiltist á øllum brøgdum, at her var okkurt við at henda.

Sosialurin var niðri á bryggjuni um midnáttarleitið og fylgdi tí, sum gekk fyri seg her, tað mest av einum tíma.

### Tryggjaðu skipið

Meðan stigabilurin setti menn upp á skipið, og kranabilur lyfti trossar upp á skipið, skiftu vit orð við átaksleiðaran hjá Skálafjarðar Sløkkiliði, Sunleiv Højgaard og spurdu hann, hvat nú var á vási.

– Vit fingu eina fráboðan í kvøld um, at fólk høvdu sæð royk koma úr skipinum aftur. Vit gjørdu eina rutinukanning og fingu staðfest, at eitt sindur av royki sást aftur koma úr skipinum. Undir kanningini staðfestu vit eisini, at Athena nú stendur meiri upp úr sjónum framman, enn skipið hevur gjørt. Tá vit so kannaðu skipið aftan eisini, fingu vit staðfest, at Athena helst hevur tikið nakað av sjógvi inni.

> **Brimil hevur havt froskmenn niðri at hyggja eftir botnventilum. Nú royna vit at pumpa sjógv úr skipinum**
>
> SUNLEIF HØJGAARD

Sunleiv Højgaard sigur, at Skálafjarðar Sløkkilið gjørdi skjótt av og bað Brimil koma inn aftur á Skálafjørðin, eins og viðkomandi myndugleikar fingu fráboðan um broyttu viðurskiftini. Vit høvdu frammanundan riggað ein leytara upp á skipið. Tað er nakað av amoniakkroyki í erva á skipinum, og tí mugu vit hava roykkavarar til uppgávuna.

Tað fyrsta, sum sløkkiliðsfólkini fóru í holt við, var at binda skipið betri, soleiðis at trossar vórðu festir ovarlaga á skrokkinum. Hetta varð gjørt fyri at tryggja sær, at skipið skuldi fella inn móti bryggjuni, um tað tók sjógv inn og í ringasta føri fór at søkka.

– Vit hava eisini roynt at tett ymisku holini ella úttøkini, sum ganga út úr skipinum, tí vit vita jú ikki, hvussu tað sær út innanfyri. Brimil hevur havt froskmenn niðri at hyggja eftir botnventilum. Nú ætla vit at royna at pumpa sjógvi úr skipinum.

Sunleiv Højgaard segði, at sigur, at einir 15-20 mans vóru við í átakinum, sum byrjaði í gjárkvøldið.

### Athena kann søkka

Átaksleiðarin væntaði um midnáttarleitið, at pumpurnar skjótt fóru at koyra.